gult4 cyan4 magenta4 svart4

Liggja óneyðuga leingi sjúk

Fólk á útoyggjum liggja óneyðuga leingi sjúk, tí tey vilja ikki órógva læknar ella vilja sleppa undan at fara av oynni, vísir Útoyggjanevndin á

HEILSA
Eyðun Klakstein

Útoyggjanevndin heldur, at fólk á útoyggjum skulu hava betri heilsutænastu.

Útoyggjanevndin vísir í sínum áliti á, at fólka á útoyggj liggja óneyðuga leingi sjúk, tí tey vilja ikki gera vart við seg hjá lækna ella sjúkrahúsi.



– Sjúklingar himprast við at venda sær til lækna, um tað nú skuldi hent, at tað ikki hevði nakað uppá seg. Ella liggja tey leingi sjúk og vóna, at tað ikki verður neyðugt at vera fluttur inn á meginøkið, sigur Útoyggjanevndin.

– Tí verður bíðað sum longst við at gera vart við, at tey eru sjúk, og úrslitið er, at sjúkralegan gerst longri og verri enn neyðugt.

Ráðið fyri kommunulæknaskipanina vísir á, at tað er avgerandi fyri teirra tænastu, at ferðasambandið er í lagi, og her verður serliga hugsað um tyrlutænastuna.

Økissjúkrasystrar

Útoyggjanevndin heldur, at heilsutænastan skal røkka út á staðið, og ikki bert tá ið støðan er akutt.

– Heilsurøktin í Føroyum byggir í stóran mun á fyribyrging, og hetta aðalmálið má vera galdandi á smáu oyggjunum eins væl og á teimum stóru, sigur Útoyggjanevndin.

– Útgangsstøðið eigur at vera, at allir borgarar í landinum eiga at fáa somu tænastu.

Útoyggjanevndin mælir til, at viðtaluhøli til lækna og annað heilsuvirksemi verður gjørt á øllum útoyggjunum, og at eitt fólk verður sett í fast starv at taka sær av heilsuspurningum. Hetta heldur Útoyggjanevndin kann vera ein økissjúkrasystur, sum skal arbeiða fast í hesum heilsudepli.

– Málsetningurin við eini slíkari skipan er at økja tryggleikan og trivnaði í oynni, sigur Útoyggjanevndin.

r is in lon
sa i una ___ til at bíleggja
n ur inni ar o
il r a o s n

S la s ron ur Sil ar on ur
li o os a

l in ars il

os al i
r
ol i

Vinarliga nýtið blokkbókstavir
Undirritaði:
Navn:___
Bústaður:___
Bygd/býur:___
ynski____eintak/tøk av bindi I og bindi II av endurminningunum hjá
Egið forlag
postboks 213
Tórshavn
il r a o s n
Bøkurnar kosta 190 kr. bindið (umfr. postgjald) og verða at gjalda hvør sær við postuppkravi, tá tær koma út, fyrra bind í apríl/mei og annað í september

sosialurin 311820

Afturgongur halda fram

Klaksvíkar Sjónleikarfelag heldur fram við at spæla leikin, Afturgongur, hesa vikuna. Hóskvøldið var ein sýning klokkan 20.00, og í aftur í kvøld verður spælt klokkan 20.00. Sunnudagin verður spælt klokkan 17.00.

Aftugongur er leikur, sum Henrik Ibsen skrivaði. Talan er um ein av best kendu leikunum hjá Ibsen, sum hevur verð spældur kring allan heim.

Fimm leikarar spæla leikin, sum viðger nøkur av lívsins grundleggjandi viðurskiftum. Leikararnir eru Adelborg Linklett, Suni Svabo Samuelsen, Jógvan Brim Joensen, Eyð Matras og Bjarni Ziska Dahl.

Caroline Zantonique og Laura Joensen hava staðið fyri leikstjórnini av leikinum.

gult5 cyan5 magenta5 svart5

Plásstrot í skúlunum í Havn

– Vit skulu rokna við, at rættiliga fitt av peningi skal brúkast til skúlabygging, umvælingar og nýgerð nógvu komandi árini, sigur Jan Christiansen, býráðsformaður í Havn

SKÚLAR
Turið Kjølbro

Stóra tilflytingin til høvuðsstaðin seinnu árini merkist eisini í skúlunum í býnum. Komandi skúlaár rúma allir skúlarnir í kommununi øllum børnunum, men nærum allir eru um at gerast ov trongir. Nakrir eru fyri langari tíð síðani á tremur, aðrir eru ov fyltir og uppaftur aðrir tørva bæði meiri pláss og ábøtur, umvælingar og nýgerð.

Samtykt er at byggja Hoyvíkar skúla út við tveimum-trimum skúlastovum afturat fyri at fáa skúlan tveysporaðar frá 1. til 7. flokk. Tá er Hoyvíkarskúli fult útbygdur. Somuleiðis er eisini samtykt at byggja uppí Heimaraskúla við Landavegin, soleiðis at hesin kann nýtast sum vanligur skúli. Toilettviðurskiftini skulu bøtast umframt skúlastovur byggjast afturat, soleiðis at fýra stovur vera. Í íløguætlanini hjá Tórshavnar kommunu eru pengar settir av til at útbyggja Argja skúla, ið hevur stórt plásstrot. Har skulu fleiri skúlastovur gerast umframt at verandi stovur mugu gerast størri. Tær rúma ikki stórum skúlaflokkum.

Frammarlaga stendur eisini ein nýggj skúlabygging í Hoyvíkshaganum, men ætlanin er ikki komin longur enn á tekniborðið. Enn er ikki greitt, hvussu nógvir næmingar fara at ganga har ella hvussu nógv skúlin fer at kosta.

– Eftir øllum at døma verður nýggi skúlin í Hoyvíkshaganum ein skúli, sum fer at minna nógv um Hoyvíkarskúla, tað vil siga ein tveysporaður barnaskúli, sigur Jan Christiansen, býráðsformaður.

Sankta Frans skúli tekur næmingar inn sum pláss er til. Tískil er ikki plásstrot sum so, men skúlabygningarnir eru kortini gamlir og tørva ábøtur og nýgerð fyri at lúka krøv, ið verða sett skúlum í dag. Venjingarskúlin hevur verið ov lítil í nógv ár, men einki ítøkiligt fyriliggur um at byggja Venjingarskúlan út. Kommunuskúlin er nóg stórur, men eisini hesin tørvar ábøtur, serliga í Gamla Realskúla, har skúlastovurnar eru ov lítlar. Eysturskúlin er nóg stórur sum er, men hevur tørv á hølunum, sum Frítíðarskúlin ræður yvir í løtuni. Ætlanin er, at Frítíðarskúlin skal út, men so leingi onnur høli ikki eru funnin, verður hann verandi har.

- Í Hoyvíkshaganum kunnu vit rokna við ,at innan næstu fáu árini koma eini 500 nýggj hús. So har hevur ein nýggjur skúli skund, sigur Jan Christiansen.

Mynd: Jens Kristian Vang

– Vit skulu rokna við, at rættiliga fitt av peningi skal brúkast til skúlabygging, umvælingar og nýgerð nógvu komandi árini. Hetta er lógarkrav, so vit hava einki val. Í Hoyvíkshaganum kunnu vit rokna við, at innan næstu trý-fýra árini koma eini 500 nýggj hús. Hetta svarar til eina lítla føroyska bygd, so har hevur ein nýggjur skúli skund, sigur Jan Christiansen.

Býráðsformaðurin roknar við, at hesin skúlin stendur klárur at taka í nýtslu til skúlaárið um tvey ár.

Nýtt MFS-ráð

NEVNDARVAL
Turið Kjølbro

Nýggja ráðið hjá Meginfelag Føroyskra Studenta, MFS, er valt og skipað, stendur á lesa í Fjølni, ið er blaðið hjá MFS. Forkvinna er Sissal Kjartansdóttir Kristiansen, næstforkvinna Halla Nolsøe Poulsen, kassameistari Jón Henriksen og skrivari Sámal Matras Kristiansen. Fleiri starvsnevndir eru undir høvuðsnevndini, og var lítil áhugi at koma í høvuðsnevndina, stóð sum skilst ikki á at fáa fólk í undirnevndirnar. Hetta kundi bent á, at arbeiðið í nevndunum verður umfatandi og at nógv fæst á skafti.

Í blaðnevndini sita Hallbera West, Sámal Matras Kristiansen, Bjørg Dam, Marita Magnussen, Sissal Kjartansdóttir Kristiansen og Katrin Apol. Trivnaðarnevndin er mannað av Hallu Nolsøe Poulsen, Bjørg Dam, Hallberu West, Katrin Apol, Aksel Johannesen, Sissal Kjartansdóttir Kristiansen og Jón Henriksen, umframt Anne-Marie Mohr Nielsen. Í granskingar- og útbúgvingarnevndini sita Sámal Matras Kristiansen, Hans Kári Vang, Rúnar Reistrup og Guðrið Weihe, umframt Guðrun Hammer. Kunningartøkninevndin er mannað av Guðrið Weihe, Bjørg Dam, Jón Henriksen, Rúnar Reistrup og Sissal Kjartansdóttir Kristiansen. Altjóða samstarvsnevndin er mannað av Hallberu West, Sámal Matras Kristiansen, og Katrin Apol. Onnur eru Anne-Marie Mohr Nielsen og Mortan í Hamrabyrgi. Í marknaðarføringsnevndini sita Guðrið Weihe, Aksel Johannesen, Sissal Kjartansdóttir Kristiansen, Bjørg Dam og Halla Nolsøe Poulsen.

Til ber at fara á heimasíðuna hjá MFS, sum eitur www.mfs.fo eftir meiri kunning um felagskapin. Nýggja heimasíða er eisini til føroysk lesandi í Danmark. Hon eitur www.lesandi.dk og har fæst vegleiðing, lestrarráð og mangt annað.

Laaaannngt vikuskifti í Keypmannahavn

hósdag til mánadag...ja!
1.995,-

Unna tær eina fríløtu í Keypmannahavn. Eitt vikuskifti har tú tekur tær av løttum og nýtur tað lýggja várveðrið, meðan tú spákar ein túr á Stroynum ella fært tær ein góðan bita í Nýhavnini. Í Keypmannahavn eru nógv freistandi tilboð.

Tú fert úr Vágum hóskvøld kl. 20.40. Tú fært sostatt arbeitt allan hósdagin, og tú hevur allan fríggjadagin í Keypmannahavn. Hygg í Út í Heim, sum er sent í hvørt hús í Føroyum. Har eru fleiri góð tilboð.

Atlantic Airways hevur nú hesar eykatúrar:

Til Keypmannahavnar:	hóskvøld	20.40
Til Føroya:	fríggjadag	09.00
Til Keypmannahavnar:	sunnukvøld	17.30
Til Føroya:	mánadag	09.00

)* Ferðaavgjald sum er kr.365,- kemur afturat prísinum

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo

SANSIR · TEL 355 355